Bilar

Nr. 18 • hósdagur • 27. januar 2005 • 79. árg.




*Ford Focus stationcar hevur stórt viðførisrúm og lessihæddin er lág*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Focus við komforti og trygdini í fokus




*Nýggi Focus er bæði longri og breiðari enn forgangarin, og aksilfrástøðan er størri*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Leygardagin 29. januar verður nýggi Ford Focus alment sýndur fram hjá P/F Wenzel í Havn. Nýggi Focus, ið er bæði størri og rúmligari enn forgangarin, fekk hægsta karakter og fimm stjørnur í EuroNCAP krasj-testunum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Eftir at hava verið á marknaðinum í seks ár og verið ein av mest seldu bilum yvirhøvur, verður núverandi Ford Focus avloystur av einum heilt nýggjum Focus.

Kappingin er beinhørð í klassanum, og tí hava Ford gjørt alt fyri at kvaliteturin, designið, komforturin, trygdin og koyrieginleikarnir skulu vera heilt í topp. Tað sær eisini út til at hava eydnast teimum.

Tað er ikki smávegis við rósandi orðum nýggi Focus fær við á leiðini frá t.d. donskum motorjournalistum. Í Bil Magasinet stóð m.a. "Den nye Focus har den bedste og mest harmoniske undervogn, man kan købe for penge i denne klasse og i klasser over".

Nýggi Focus er bæði longri og breiðari enn forgangarin, og aksilfrástøðan er størri. Hetta gevur mundandi betri pláss í kabinuni, sum er væl ljóðdoyvd og merkt av gjøgnumførdum kvaliteti. Eisini er kabinan gjørd úr umhvørvisvinarligum tilfari, sum verjir móti ovurviðkvæmi.

Motorskráin sær soleiðis út: Bensinmotorar: 1,4 litur við 80 hk, 1,6 litur við 100 hk, 1,6 litur Ti-VTC við 115 hk, og ein 2,0 litur við 145 hk. Dieselmotorar: 1,6 litur TDCi við 109 hk og ein 2,0 litur TDCi við 136 hk.

Nýggi Focus hevur nakrar av mest framkomnu trygdarskipanum í sínum klassa til at verja tey ferðandi í bilinum. Bilurin fekk hægsta karakter og fimm stjørnur í EuroNCAP krasjtestunum. ESP er standard í øllum útgávunum.

Focus fæst í fimm ymiskum útgávum hvat útgerð viðvíkur: Ambiente, Trend, Sport, Ghia og Titanium. Ambiente er standardútgávan, og Titanium er luksusútgávan við allari útgerð.

Bilurin kemur í fyrstu atløgu sum hatchback við trimum og fimm hurðum og sum stationcar, sedan útgávan kemur seinni. Bíligast Focus 1,4i Ambiente kostar 197.500 krónur.

Leygardagin 29. januar frá kl. 10-17 verður opið hús hjá P/F Wenzel, har høvið verður at síggja og royna nýggja Focus.



*Kabinan er væl ljóðdoyvd og gjørd úr umhvørvisvinarligum tilfari*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Aftan líkist nýggi Focus forgangaranum við lyktunum við síðuna av bakrútinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Ford Focus 1,6 Trend 5/h

| | | | |
|---|---|---|---|
| Motorurin: | 1,6 litur 4. syl bensin 100 hk | Eginvekt: | 1.350 kg |
| 0-100 km/t: | 10,1 sek | Viðførisrúm: | 385 litrar |
| Bensinnýtsla: | 15,6 km/l (blandað koyring) | Prísur: | kr. 221.600,- |
| Dekkstødd: | 195/65-15 | Søluumboð | P/F Wenzel |
| Stødd og vekt | | | Akranesgøta 5 |
| Longd: | 434,2 cm | | FO-110 Tórshavn |
| Breidd: | 174,0 cm | | Tel. 354500 |
| Hædd: | 144,7 cm | | www.wenzel.fo |